gult2 cyan2 magenta2 svart2





Minningarorð um

## Símin Sofus Joensen

**vanliga nevndur Símin á Syðradali**
**f. 8.2.1914 d. 8.3.2001**



Leygarmorgun 8. mars andaðist Símin. Eg visti at Símin var sjúkur, men eg væntaði at tað fór at ganga og at hann kom fyri seg aftur. Eg hevði verið á sjúkrahúsinum og vitjað hann, og tá helt hann fyri, at nú styttist til hann kom at skoða Frelsaran, ið hann nú hevði sett sítt álit á, men eg segði við hann, »tú sært so fittur út, eg vænti at Harrin letur teg koma heim eina ferð enn«. Tað var so hugnaligt at hava Símin ímillum okkum.

Hann hevði verið í føðingardegi hjá Olgu leygardagin og var í so góðum lag, tá ið hann fór avstað aftur. Og tá helt hann fyri, »her standi eg saman við einum fínum manni«, tað vóru myndir, ið Olga hevði av Kjølbro og Olgu mostur og Gerdu og Símin, ið stóðu saman men eg segði við hann, »Kjølbro hevði ikki verið til, um Símin og fleiri við honum ikki eisini høvdu verið til«. Tá helt hann, »jú, so er«.

Góði Símin, vit sakna teg, tú vart so góður við dóttur okkara, altíð klárur at hjálpa. Tað var so hugnaligt at hoyra, tá ið tú fortaldi tað, ið tú hevði upplivað. Ógloymandi eru allar søgurnar, ja, tær eru mangar í tali, ið tú hevur fortalt. Serliga dámdi okkum ógvuliga væl at lurta eftir, tá ið tú fortaldi okkum frá tínum ungdómsárum á sjónum. Tað kom so nógv spennandi fram, tá ið tú segði søgurnar, hvussu Harrin hevði hildið hondina yvir tykkum og leitt teg heimaftur. Og nú fyri stuttum fortaldi tú, at nú hevði tú funnið frið og hevði takkað Harranum fyri tað, Hann hevði gjørt fyri teg.

Nú verður tómligt hjá tykkum, Paul Jakku og Jóhannes, nú eingin Símin er longur, men gott er at vita, at Símin gleðist í Harranum, sum hann hevði sett álit sítt á.

Hann plagdi at siga, nú hann hevði mist Gerdu, »at nú mátti Harrin taka hann heim í dýrdina skjótt, tí nú var hann troyttur«, og nú er hann eisini sloppin heim til tey, ið eru farin undan honum.

Má Harrin eins og hann bar Símin seinastu dagarnar á bønarinnar veingjum, styrkja og troysta tykkum børnini við familju.

Friður veri við minninum um ein dygdarmann.

*Tá so stríðið her er runnið*
*málið nátt og stríðið vunnið*
*Harrans rødd við okkum kallar*
*heim í gleði alla.*

**Jórun**

# Akademiøkonomur í detailhandli

Føroyar hava fingið sín fyrsta akademiøkonom við sergrein í detailhandli. Tað er 26 ára gamli havnarmaðurin Dánial Jespersen, sum júst hevur fingið prógv frá Niels Broch í Keypmannhavn. Dánial hevur tikið útbúgvingina sum heimalestur umframt at hann hevur havt fulldags arbeiði í Miklagarði í SMS í Havn. Hetta hevur verið strævin tíð, skilst, tí útbúgvingin er rættiliga krevjandi og pensum er sera stórt.

Dánial ætlar sær at halda fram í spennandi og avbjóðandi arbeiðinum í Miklagarði, har hann er 1. maður tvs. høgra hond hjá dagliga leiðaranum. Arbeiðið er rættiliga fjølbroytt við at bíleggja vørur, syrgja fyri, at røttu vørurnar eru á hyllunum osfr. Tað skilst, at honum dámar sera væl hetta arbeiðið og at hann annars er sera dugnaligur og arbeiðssamur.

Dánial hevur so eisini eina rættiliga drúgva fortíð hjá nettupp Miklagarði. Hann hevur verið har í 8 ár.



*Ein fegin Dánial Jespersen, 1. maður í Miklagarði, sum nú er vorðin Føroya fyrsti akademiøkonomur við sergrein í detailhandli*

*Mynd Jens K. Vang*

Eftir eitt ára FAS útbúgving á Handilsskúlanum fór hann í læru í Miklagarði. Tað tók tvey ár og síðani hevur hann arbeitt hjá fyritøkuni samtíðis sum hann hevur lisið til akademiøkonom við detailhandli sum sergrein. Útbúgvingin á Niels Broch er tvey ára útbúgving.

# Áhugavert skeið í modernaðum dansi

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 5. mai kl.13.00-16.00 verður skeið í modernaðum dansi í høllini á Stórheyggi. Tað er Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen, ið hevur skeiðið.

Várið 2000 var Sóleyð á dansilinjuni á Ítróttarháskúlanum á Oure, og hon fór síðani víðari til Århus at ganga á dansiskúla.Hon er júst liðug á MBT-danseteater og vil nú geva dansi- og fimleika áhugaðum møguleikan at royna seg innan modernaðan dans.

# Motorsúkklutreff í Havn

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin tann 5. mai skipar motorsúkklufelagið Føroya-MC fyri motorsúkklutreffið "MC-Boogie". Hetta er eitt treff, har øll motorsúkkluáhugaði, sum eiga eina motorsúkklu, eru vælkomin við at koyra ein túr. Um kvøldið verður so veitsla í Kagganum fyri tey, ið hava hug til tað.

Hetta er fyrstu ferð, at Føroya-MC, ið varð stovnað 3. september 2000, skipar fyri hesum tiltaki. MC-Boogie er tó ikki ókent fyri motorsúkkluáhugaði, tí Føroya Ellisakfør hava skipað fyri hesum tiltaki fleiri ferðir áður. Í ár hava Føroya-MC og Føroya Ellisakfør so avgjørt at skipa fyri einum MC-Boogie í part - sostatt tað fyrra leygardagin tann 5. mai, og tað seinna væntandi í september.



*savnsmynd*

Tey, ið hava hug til at koma við til MC-Boogie, kunnu koma niðan á Shellstøðina við Ringvegin leygardagin kl. 11.00. Tað er nevniliga soleiðis, at Føroya-MC hava verið so heppin at fáa eina sponsoravtalu við Føroya Shell fyri eitt ár, og tí verða tiltøkini, sum felagið skipar fyri, sett í gongd frá onkrari Shellstøð. Har verður so møguleiki at fáa ein kaffimunn og eitt prát við onnur motorsúkkluáhugaði, og eisini verður tilmelding til veitsluna um kvøldið.

Kl. 12.00 verður so felagstúrur, fyrst ein túr gjøgnum býin, og síðani verður koyrt norður til Streymin, runt Eiðisskar, til Elduvíkar og síðani til Shellstøðina í Gøtudali. Har verður kaffi og køkur, og eisini verður skipað fyri onkrari kapping.

Eftir steðgin verður so koyrt til Havnar aftur, har enda verður við Super Dekk, ið eisini stuðlar tiltakinum.

Føroya-MC vónar, at nógv motorsúkkluáhugaði koma við til hetta tiltakið, og at øll fáa ein hugnaligan dag.

gult3 cyan3 magenta3 svart3



Príslækking
- enn einaferð!

-16%
á fastnettelefoni innanlands
Nú kostar tað einans **32 oyru** um minuttin um dagin og **22 oyru** um minuttin um náttina at siga tað um fastnettelefonina innanlands.

upp til -44%
á fastnettelefoni til útlond

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum

Tilboð beint nú!
ÓKEYPIS stovning av internethaldi
SPAR 400,00 kr.
Beint nú er tað **ókeypis** at stovna eitt internethald hjá Føroya Tele. Tilboðið er galdandi til 1. august 2001.

Føroya Tele • Postboks 27 • 110 Tórshavn • Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • e-mail: ft@ft.fo • www.tele.fo

petur & petur • 320870